Vestmanna kommuna
Bakkavegur 8
355 Vestmanna

Argir hin 21. Juni 2024
Málsnr.: 24/07736
Málsviðgeri: Rúna Hjelm

# Loyvi til aftursøkking

## 1 Loyvi og heimild

Sambært § 2 í kunngerð nr. 38 frá 8. mars 2001 *um aftursøkking av tilfari, sum er tikið upp av havbotninum*, veitir Umhvørvisstovan við hesum Vestmanna kommunu treytað loyvi til at aftursøkkja tilfar úr bátahylinum í Vestmanna og leggja tilfarið í fjøruna í økinum frá Seglhúsinum yvir ímóti pirinum frá Fitjalandinum (sí frámerkt øki á mynd 1).

## 2 Umsóknin

Hin 14. mars 2024 fekk Umhvørvisstovan umsókn frá Vestmanna kommunu um loyvi at aftursøkkja tilfar, sum ætlanin er at taka upp í bátahylinum í Vestmanna. Samlaða nøgdin, sum verður tikin upp, er mett til millum 10.0000 og 15.000 m$^3$. Søkt verður um loyvi at søkkja tilfarið í økið frá Seglhúsinum inn ímóti pirinum frá Fitjalandinum (sí mynd 1 niðanfyri).




**Mynd 1.** Kort, ið vísir staðseting, har tilfarið úr bátahylinum verður søkt

## 3 Málsgongd

Sambært grein 5 í kunngerð um aftursøkking, skulu umsóknir sendast til Fiskimálaráðið, Landsverk og avvarðandi kommunum til ummælis.

25. mars 2024 varð umsóknin send Fiskimálaráðnum, Landsverki og Kvívíkar kommunur til ummælis. Landsverk og Kvívíkar kommuna høvdu ikki viðmerkingar til umsóknina. Fiskimálaráðið hevði hesa viðmerkingina til ætlanina:

> "Ráðið hevur sent umsóknina víðari til Havstovuna og Vørn til hoyringar.
>
> Við støði í viðmerkingum frá Havstovuni skal Ráðið mæla til, at slík aftursøkking av sandi, móru o.l. tilfari verður gjørd á streymasjógvi, týðiliga uttan fyri fjørðin ella sundið, soleiðis at tilfarið, sum verður spjatt, ikki verður til ampa fyri alifisk og annað lív á fjørðingum ella í sundinum."

Grundað á niðurstøðuna hjá Fiskimálaráðnum/Havstovuni fekk Vestmanna kommuna í fyrstu syftu noktað loyvi frá Umhvørvisstovuni til at leggja tilfarið úr bátahylinum í fjøruna við pirin við Fitjulandið. Svarið frá Umhvørvisstovuni varð sent Vestmanna kommunu 24. apríl 2024.

Vestmanna kommuna sendi 1. mai 2024 bræv til Umhvørvisstovuna við áheitan um at taka málið upp aftur til nýggja viðgerð. Ført verður fram, at tá Kvívíkar kommuna fyri nøkrum árum síðani tók tilfar úr bátahylinum á Válinum, gav Umhvørvisstovan kommununi loyvi til at leggja tilfarið norðanfyri bátahylin á Válinum.

Í t-brævi frá Vestmanna kommunu til Umhørvisstovuna dagfest 22. mai 2024 verður dentur lagdur á, at søkt verður um lovi:

> "til at leggja tilfar á sjógv innanfyri Seglhúsið soleiðis, sum søkt er um, við tí fyri eygað at endurskapa sandstrondina fram við Fitjum og pierinum, sum hevur landfesti á Fitjum, og harvið eisini at endurskapa grindavágna, sum hon upprunaliga var."

Grundað á nýggjar upplýsingarnar frá Vestamanna kommunu, metti Umhvørvisstovan, at grundarlag var fyri at taka málið uppaftur til nýggja viðgerð. Í nýggju málsviðgerðini varð mett neyðugt at hoyra fleiri partar, eitt nú alifyrisitingina á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og Hiddenfjord/Luna, sum hevur aliloyvi í Vestmannafirði.

Í t-brævi dagfest 15. mai 2024 sigur Luna seg taka undir við niðurstøðuni hjá Havstovuni, men í t-brævi dagfest 23. mai sendir Luna nýggja niðurstøðu til Umhvørvisstovuna. Í seinna hoyringarsvarinum frá Luna sigur felagið seg taka undir við ætlanini hjá Vestmanna kommunu, og at Umhvørvisstovan skal síggja burtur frá fyrra hoyringarsvarinum (sí svar niðanfyri):

> "Vit hava nú verið i samband við Vestmanna kommunu og eru nú betur kunnaði um málið. Vinarliga síggi burtur frá okkara hoyringssvari dagfest 15.05.2024.
>
> Vit hava fingið vissu fyri, at arbeiðið verður gjørt soleiðis at tað ikki fer at nerva okkara aling á staðnum.
>
> Sum hoyringspartur hava vit onga viðmerking til málið og eru ikki ímóti at Vestmanna kommuna ger hetta arbeiðið."

Í hoyringarsvari frá Heilsufrøðiliga starvsstovuni (HFS) dagfest 28. mai 2024, tekur HFS undir við ætlanini hjá Vestmanna kommunu at aftursøkkja botntilfar. Tó verður mælt til, at Vestmanna kommuna tekur P/F Luna fult við upp á ráð við tíðarætlan, ráki inni á fjørðinum v.m. Hetta er tí, at fiskurin møguliga kann fáa trupulleikar við táknunum undir og eftir at tilfar verður søkt inni á fjørðinum. Eisini mælir HFS til, at girðing/skjúrt verður nýtt, meðan arbeitt verður, fyri at tálma útbreiðsluni av bitlum í sjónum.

Umhvørvisstovan skipaði fyri ástaðarfundi 31. mai 2014 á strondini millum Seglhúsið og pirin á bátahylinum í Vestmanna (sí mynd 2). Umboð frá Vestmanna kommunu og Hiddenfjord luttóku á fundinum.





**Mynd 2.** Strondin frá pirinum til Seglhúsið sunnan fyri bátahylin í Vestmanna

Á ástaðarfundinum greiddi borgarstjórin í Vestmanna frá, at Vestmanna kommuna hevur ætlanir um at menna økið sum eitt rekreativt øki fyri borgarar í kommununi, og eitt nú eru tað ætlanir um at byggja hita- og skiftingarrúm beint ið strondina. Eisini metir kommunan, at tað hevur týdning at halda grindavánna við líka, við at leggja nýggjan sand á økið. Seinastu ferð sandur bleiv lagdur á økið, var í 80'unum.

Umboðini fyri Luna høvdu spurningar til, hvussu kommunan ætlaði at skipa arbeiðið, og hvørji krøv Umhvørvisstovan ætlaði at seta til loyvið.

Niðurstøðan var, at Vestmanna kommuna skal leggja arbeiðið til rættis í samráð við Luna/Hiddenfjord, og at krav verður sett til, at girðing/skjúrt verður nýtt, meðan arbeiðið fer fram. Harumframt verður krav sett um, at vísir tilfarið seg at vera dálkað, so skal arbeiðið steðgast alt fyri eitt og fráboðan sendast Umhvørvisstovuni, og at tað sama er galdandi, um tað vísir seg, at alifiskurin verður ávirkaður av arbeiðinum.

## 4 Kanningar av botntilfarinum

Umhvørvisstovan hevur ikki orsøk til at halda, at tilfarið inniheldur dálkandi evnir, og tí verður ikki sett krav um at gera kanningar av tilfarinum.

# 5 Avgerð

Umhvørvisstovan metir, at tilfarið sum er savnað í bátahylinum í Vestmanna, og sum ætlanin er at leggja á strondina frá pirinum til Seglhúsið, neyvan fer at verða til stórvegis ampa, um treytirnar í 5.1 verða hildnar.

Hetta inniber eitt nú, at Vestmanna kommuna skal leggja arbeiðið til rættis í samráð við Luna. Harumframt at um tilfarið vísir seg at vera dálkað, so skal arbeiðið steðgast alt fyri eitt og fráboðan sendast Umhvørvisstovuni, og somu treytir eru galdandi, um tað vísir seg, at alifiskurin verður ávirkaður av arbeiðinum hjá Vestmanna kommunu.

Grundað á tilmælini í málinum, niðurstøðuni frá ástaðarfundinum og egnar metingar, hevur Umhvørvisstovan tikið avgerð um at veita Vestmanna kommunu treytað loyvi til at søkkja 10.000 - 15.000 $m^3$ av tilfari í økinum frá Seglhúsinum og yvir ímóti pirinum sunnanfyri bátahylin í Vestmanna.

## 5.1 Treytir

Loyvið til aftursøkking er treytað av hesum ásetingum:

5.1.1 Aftursøkkingin kann ikki fara fram, fyrr enn kærufreistin er úti, t.v.s. 4 vikur frá at avgerðin er lýst.

5.1.2 Loyvið fevnir bert um tilfar, sum er tikið upp av botni á økinum, sum tilskilað í umsóknini

5.1.3 Vestmanna kommuna hevur skyldu at ansa eftir, at sandurin ikki verður tikin upp ov tætt at pirinum, og soleiðis at ansa eftir, at støðið ikki verður tikið undan grótfyllingini.

5.1.4 Vestmanna kommuna hevur skyldu til at leggja arbeiðið til rættis í samráð við P/F Luna.

5.1.5 Vestmanna kommuna hevur skyldu til at fylgja við, um sandurin verður liggjandi á staðnum, og hvar hann møguliga flytur seg.

5.1.6 Kommunan hevur skyldu til at tryggja, at skjúrt ella líknandi verður nýtt, meðan arbeitt verður við at aftursøkkja tilfarið. Skjúrtið skal vera egnað til at tálma útbreiðsluni av bitlum í sjónum.

5.1.7 Um alifiskurin verður ávirkaður av arbeiðinum, og sannlíkindi eru fyri at orsøkin stavar frá arbeiðinum við at aftursøkkja tilfar, má arbeiðið steðgast beinanvegin og kommunan senda fráboðan til Umhvørvisstovuna.

5.1.8 Um sandurin vísir seg at vera dálkaður, má arbeiðið steðgast beinanvegin og fráboðan sendast Umhvørvisstovuni.

5.1.9 Um aðrir ampar standast av aftursøkkingini, skal Vestmanna kommuna seta bøtandi tiltøk í verk.

5.1.10 Umhvørvisstovan skal í seinasta lagi átta dagar frammanundan hava boð um, nær arbeiðið byrjar. Eisini skal boðast frá, beint eftir at arbeiðið er liðugt.

5.1.11 Nøgdin, sum verður aftursøkt, skal skrásetast saman við tíðarskeið, knattstøðu, dýpi og hvaðani tilfarið er tikið.

5.1.12 Tá arbeiðið er liðugt, skal Vestmanna kommuna senda frágreiðing til Umhvørvisstovuna við upplýsingum um, hvussu nógv er aftursøkt, nær arbeiðið varð gjørt o.s.fr.

5.1.13 Er arbeiðið ikki gjørt eitt ár aftaná at loyvið er givið, fellir loyvið burtur.

## 6 Eftirlit

Umhvørvisstovan hevur eftirlit við, at treytirnar í hesum loyvi verða hildnar. Vestmanna kommuna skal lata allar upplýsingar, sum eru neyðugar, og skapa umstøður fyri, at Umhvørvisstovan kann útinna eftirlitið.

## 7 Gjald

Vestmanna kommuna skal, sambært kunngerð nr. 102 frá 22. oktober 2012 um gjøld hjá Umhvørvisstovuni fyri umsiting og eftirlit sambært lóggávuni á umhvørvisøkinum, rinda fyri ta viðgerð, sum Umhvørvisstovan hevur havt í sambandi við hetta loyvi. Somuleiðis skal gjaldast fyri møguligt eftirlit.

Gjaldið verður roknað við grundarlagi í tíðarnýtsluni og øðrum kostnaði í sambandi við viðgerðina.

## 8 Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært grein 10 í kunngerð nr. 38 frá 8. mars 2001 *um aftursøkking av tilfari, sum er tikið upp av havbotninum*, kærast til landsstýriskvinnuna í umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum saman við neyðugum skjølum, sendir hana til landsstýriskvinnuna.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umsøkjarin fekk fráboðan um avgerðina.

Loyvið fær ikki gildi fyrr enn kærufreistin er úti.

Sigga Jacobsen, deildarleiðari

/

Rúna Hjelm, umhvørvisviðgeri